

**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

# Aftursvar til álop frá blaðstjórnini á Sosialinum um sparingar í eldrarøkt

Við eini yvirskrift í heldur latrinerum stíli loypir blaðstjórnin á Sosialinum á meg í blaðnum mánakvøldið, har eg verði samanborin við hund, ið etur tað hann havnar. Ikki eiti á skoðsmál at fáa frá Sosialinum. Veit ikki hvør ið skrivar - men tað er ein redaktionel viðmerking á s. 2, uttan at navn stendur undir.

Boðskapurin hjá blaðstjórnini er, at hóast eg í summar vegna Javnaðarflokkin talaði harðliga ímóti ætlaðum sparingum í eldrarøktini, sum landsstýriskvinnan í almannamálum hevði í umbúna – so skal eg nú sambært blaðstjórnini hava góðtikið somu sparingar í eini grein, eg skrivaði í vikuskiftisblaðnum.

Hetta er ikki rætt. Haldi at blaðstjórnin hevur misskilt, hvat ætlaðu sparingarnar vóru í summar, og hvat vit nú hava gjørt semju um í samgongumeirilutanum í smb. við fíggjarlógina. Veruleikin í málinum er hesin: Í summar kom fram, at landsstýriskvinnan ætlaði at fremja hesar sparingar í búplássum í eldrarøktini - og tað var hetta eg reageraði ímóti:

- Á Korndalsbýlinum á Eiði skuldu 5 pláss niðurleggjast 1. okt. 2011
- Tá nýggja røktarheimi letur upp í Vestmanna við 24 plássum á heysti 2011, skuldu búfólk og starvsfólk frá gamla eldrasambýlinum í bygdini flyta inn á røktarheimið har.
- Tann 1. apríl 2011, tá nýggja røktarheimið skuldi lata upp í Vági við 24 plássum, skuldu 13 pláss niðurleggjast á Tvøroyri, 5 á eldrasambýlinum og 8 á Suðuroyar ellis- og røktarheimi. Í tí sambandi skuldi starvsfólkini uppsigast á eldrasambýlinum og røktarheiminum á Tvøroyri – longu 1. okt. í ár skuldu eini 15 starvsfólk fáa uppsagnarskriv.
- Heimið á Mýrunum í Runavík skuldi latast aftur 1. jan 2011 og 8 búpláss til dement ella minnisveik leggjast niður og brúkararnir flytast til Eysturoyar Ellis- og røktarheim.
- Í eldrasambýlinum Gøtubrá skuldu 6 umlættingarpláss umskipast til sambýlispláss 1. jan. 2011.

Javnaðarflokkurin – og onnur í samgonguni – vildu ikki góðtaka so víðfevndar sparingar í eldrarøktini. Í arbeiðinum við fíggjarlógaruppskotinum er tað so eydnast okkum at gera eina semju, har hesar broytingar eru gjørdar í upprunaligu spariætlanunum:

- Niðurleggingin av teim 5 búplássunum á Korndalsbýlinum á Eiði er tikin aftur
- Niðurleggingin av Heiminum á Mýrunum er tikin aftur.
- Ætlaða afturlatingin av eldrasambýlinum í Vestmanna verður ikki aktuel í 2011, tí nýggja røktarheimið har verður ikki klárt fyrr enn fyrst í 2012. Hinvegin hava partarnir frá byrjan tikið undir við hesi ætlan.
- Niðurleggingin av Eldrasambýlinum á Tvøroyri er tikin aftur.
- Ætlaða hópuppsøgnin av starvsfólki á Suðuroyar ellis- og røktarheimi er tikin aftur, og semja er gjørd um ein nýggjan leist fyri tillaging av teim 8 dupultstovunum til einkultstovur, so hetta verður gjørt so líðandi gjøgnum árið, so hvørt brúkarar fella frá, og eisini við teirri fyritreyt, at avlopspláss verða á nýggja røktarheiminum í Vági.

Blaðstjórnin dregur eisini borgarstjóran í Vági, Kirsten Strøm Bech , upp í sína viðmerking. Til hetta er at siga, at í summar fingu vit í Javnaðarflokkinum eitt skriv frá borgarstjórum og býraðslimum í Vági, Porkeri, Sumba og Hovi, har tey mótmæla táverandi ætlanini hjá landsstýriskvinnuni, men hvar tey eisini siga soleiðis: "Vit undirritaðu eru ikki ósamd um, at ábøtur og broytingar eru neyðugar á Suðuroyar ellis- og røktarheimi, men hesar eiga at gerast eftir at heimið í Vágið er latið upp – og við eini náttúrliga frágongd, tvs. so hvørt folk doyggja."

Tað er just hesin leisturin, sum nú verður galdandi eftir teirri semju, sum er gjørdur í samgonguni.

Samanumtikið er tí onki hald í álopinum hjá blaðstjórnini á meg – tvørturímóti eri eg glaður fyri, at vit í høvuðsheitum fingu semju um tær broytingar , sum vit ynsktu.



**Tóra við Keldu**

# Fólkaskúlin er ein gentuskúli

At fólkaskúlin er ein gentuskúli, sum byggir á kvinnuligir normar og virðir, eiga politikarar, skúlaleiðslur og avvarðandi at føroyska fólkaskúlanum at taka í álvara. Ynskja vit ein skúla, har gentur eru fittar og friðarligar, og har dreingir meir ella minni eru fremmandir fyri einum góðum og gevandi læruumhvørvi?

### Bæði kyn í gentuskúla

Næmingar eru ymiskir og mugu tí hava ymiska undirvísing. Í verandi skipan fáa bæði dreingir og gentur trupulleikar - dreingir fyrr og gentur seinni. Gentuskúlin gevur ikki dreingjum ein nøktandi skúladag og brynjar ikki gentur nóg væl til mansdomineraða samfelagið.

Kanningar vísa, at fleiri gentur enn dreingir fara víðari til bókligan lesnað. Fleiri kvinnur enn menn fullføra eina útbúgving. Fyri hvørja gentu í serundirvísing eru tríggir dreingir. Gentur fáa betri skotsmál - nú eisini í støddfrøði, sum leingi varð kallað ein dreingjalærugrein.

Um vit síðani hyggja at somu næmingum, tá ið tey nøkur ár seinni eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, er myndin vend á høvdið. Tað er sjón fyri søgn. Tá eru dreingirnir stjórar, leiðarar og politikarar. Hóast eina góða byrjan í skúlanum hava genturnar ilt við at bjóða seg fram.

### Mannligir lærarar tíma ikki gentuskúlan

Samfelagið hevur seinastu árini staðið fyri eini vælkomnari broyting á mongum økjum. Frá siðbundna samfelagnum, sum á mangan hátt setti mørk fyri, hvørjar møguleikar fólk høvdu á arbeiðsmarknaðinum, kunnu vit í dag bjóða okkum fram og gera tað, vit hava hug til.

Hetta hevur tó eisini við sær, at persónligu krøvini gerast størri, og at starvið skal geva meining og vera eitt slag av persónsmenning.

Nýggj krøv seinastu árini hava lagt óánaða byrðu á læraran. Hóast tað var ynskiligt, at lærarar høvdu orku og hug til at vera bæði eitt og annað, so er veruleikin ein annar. Nú fleiri av dagligu uppgávunum hjá lærarum ikki er ein faklig avbjóðing, fara lærarar í annað starv - serliga mannligu lærararnir. Vaksandi týdningurin í umsorgan fyri næmingunum og uppgávum, sum onnur áttu at loyst ger, at lærarafleikluturin hjá mongum ikki gevur meining.

Ístaðin fyri fakliga at menna lærararnar til uppgávuna at skapa ein livandi skúla, við kvinnum og monnum, fyri gentur og dreingir, er skúlin ein gráur gentuskúli, har fakliga støði er ov lágt.

### Er nøkur loysn?

Lætt er at peika á trupulleikarnar, men torførari er at loysa teir. Soleiðis er óivað eisini við hesum. Tó kunnu vit siga, at tá læraraleikluturin ikki gevur somu meining, sum hann gjørdi fyrr, er óivað best at byrja har.

Hugsandi er, at alt hetta hongur saman, tí serliga mannligu lærararnir hava ikki hug at arbeiða í gentuskúlum, har størri týdningur er í at fáa næmingarnir at hava tað gott, enn í fakligari vælveru.

Fyrr var læraraleikluturin einfaldari og undirvísingin meir konkret og samanhangandi, lærarin gjørdi tað, hann var útbúgvin til, og fólk tosaðu virðiliga um hetta starv. Tó eg á ongan hátt ynski gamla skúlan aftur, er hetta avgerandi treytir fyri trivnað hjá lærarum. Hetta gevur sjálvsálit og harvið eisini trivnað hjá næmingunum.

Lærarar eiga at fáa tíð og møguleikar til fakligar avbjóðingar, so bæði kvinnur og menn í felag kunnu menna fólkaskúlaøki. Áhugavert er at vísa til tíðindastubba hjá DR í vikuni, har formaðurin í LO, Harald Børsting, og stjórin í DI, Lars Goldschmidt, vístu á, at støðug menning av fólkaskúlanum er grundarlagið undir samfelagsligari framgongd í alsamt vaksandi avbjóðingunum. Tí ávara teir álvarsliga donsku stjórnina um ikki at skerja játtanina til fólkaskúlan.